# Runavíkar Kommuna

Søkir eftir

## Starvsfólki til Barnagarðin á Mýrunum

**Søkt verður eftir:**
2 pedagogum 20/40t um vikuna, til farloyvisstørv í serstovuni, við møguleika fyri fastum starvið á stovninum eftir summarsteðgin

**Førleikakrøv:**
vit sóknast eftir starvsfólki, ið eru nýhugsandi og ígongdsetandi og eru opin, jalig, duga at veita umsorgan og hava góð samstarvsevnir. Vit ynskja, at tú, í tøttum samstarvi við starvsfelagar og foreldur, kann skapa ein fjølbroyttan, mennandi og tryggan dag fyri hvørt einstakt barn.

**Vit bjóða tær:**
eitt spennandi starv við nógvum fjølbroyttum avbjóðingum í dagligdegnum, har tú blívur ein partur av okkara breiða starvsfólkahópi, har tað námsfrøðiliga arbeiðið verður raðfest høgt. Dentur verður lagdur á, at møguleiki er fyri fakligari og persónligari menning.

Størvini verða sett soleiðis: annað sum skjótast og hitt frá uml. 1. mars 2009 ella eftir nærri avtalu. Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv. Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Nærri fæst at vita um størvini við at tosa við Eyðnu Norðfoss, leiðara ella Jastrid Weihe, varaleiðara á tlf. 448254 ella 218254.

Umsókn við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 13. februar 2009, kl. 12.00.

Runavíkar Kommuna
Heiðavegur 26
Postrúm 139
FO-610 Saltangará

Í Barnagarðurin á Mýrunum ganga 94 børn. Á stovninum eru 2 vøggustovur, 3 barnagarðsstovur og 1 stova til børn við serligum tørvi. Umstøðurnar á stovninum eru sera góðar við ljósum rúmligum stovum við eyka spælirúmi. Harumframt er verkstaður, sansirúm, samtalu/venjingarrúm og stórt felags/rørslurúm við barnavinarligum køki. Stovnurin liggur í vøkrum náttúrulendi beint við Toftavatn og nær við ítróttarøkið



## Kom og steðga vónloysinum

Kom og ver við at fría samvitskufangar, forða avrættingum og steðga pínin. Kom og Skriva fyri lívi.

amnesty international
www.amnesty.fo

AP BUSSKOYRING

# AP Busskoyring Kubb

**Verður á Kamsdali leygardagin 14. február. Víkingur skipar fyri kappingini.**

**Aldursbólkar, gentur:**
Pinkur ................ (f. 2000 – 01)
Pinkur ................ (f. 1999)
Gentur .............. (f. 1998)
Gentur .............. (f. 1997)
Smágentur......... (f. 1995 – 96)
Gentur .............. (f. 1991 – 94)

**Stuttligt hevði verið at sæð nógv gentulið.**

**Aldursbólkar, dreingir:**
Pinkulingar......... (f. 2002)
Pinkulingar......... (f. 2001)
Smápiltar ........... (f. 2000)
Smápiltar ........... (f. 1999)
Piltar ................. (f. 1997 – 1998)
Smádreingir ....... (f. 1995 – 1996)
Dreingir ............ (f. 1993 – 1994)
Unglingar........... (f. 1990 – 1992)

5 leikara eru á vøllinum ísenn upp til aldursbólkarnar smádreingir og gentur 12 – 14 ár, málverji íroknaður. Hjá dreingjum, unglingum og gentum 14 – 17 ár eru 4 leikara á vøllinum samstundis, málverji íroknaður.

1 leikari kann sita uttanfyri hjá hvørjum liðið.

Kostnaður fyri hvørt lið er 250 kr.

Tilmelding á telefon: 742024, 730053, 743322 ella við at senda teldupost á arndis@gigotu.fo í seinasta lagi mikudagin 11. februar.

## Lesið Sosialin - so eru tit við



# Selja bilin?
– set hann í Sosialin!

Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya

## Temadagar fyri sjúkrarøktarfrøðingum og sjúkrarøktarfrøðilesandi

**12. og 13. mars kemur cand. mag í heimspeki og sálarfrøði, ph.d stipendiat, Jacob Birkler til Føroyar at hava temadagar fyri sjúkrarøktarfrøðingum og -lesandi í Norðurlandahúsinum.**

**12. mars**

**Heimspekiligi amboðskassin hjá sjúkrarøktarføðingum.**

**Etikkur og menniskjaáskoðan í kliniskari sjúkrarøkt**

Dagurin er ætlaður øllum sjúkrarøktarfrøðingum og -lesandi.

**13. mars**

**Tá etikkurin gerst sjónligur.**

**Hvat sermerkir etikkin og hvussu viðgera vit etisku tvístøðuna í dagliga arbeiðinum?**

Dagurin er ætlaður kliniskum vegleiðarum og lesandi á klinisku vegleiðaraútbúgvingini.

Nærri skrá sæst á www.sff.fo

Kostnaður: 200 kr.

Tilmelding áðrenn 1. mars á tlf. 352250 ella við telduposti til srfs@skulin.fo

**Sjúkrarøktarfrøðiskúli Føroya**
Stuðlað hevur Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

SJÚKRARØKTARFRØÐISKÚLI FØROYA
Jónas Broncksgøta 25 · FO-100 Tórshavn · tel: 352 250
fax: 352 251 · heimasíða: srfs.fo · t-postur: srfs@srfs.fo

# Hús til sølu

Húsini í kongagøtu 1 í Tórshavn eru til sølu, um hóskandi boð fæst.

**Meira fæst at vita við at ringja á tlf: 217272**

# Sethús í Vági til sølu

Um hóskandi boð fæst, eru sethúsini á Skálavegi 22 til sølu.

**Tlf. 37 39 54**

## Tvøroyra Klubbi til leigu

Um tú ert áhugað/ur, so er klubbin við ella uttan Suðurbio til leigu.

Nærri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til nevndina.

**Tvøroyrar Klubbi**